

# FØROYSKI ÍSLENDINGURIN STUÐLAR ANGHEL

**Tað hevur verið ein drúgv verkætlan hjá Sorin Anghel at gerast danskur ríkisborgari. Finnur Hansson stuðlar rumenanum, hóast tað er eitt stríð. Føroyski íslendingurin greiðir her frá sínari søgu**

Uni Holm Johannesen

Finnur Hansson setur seg aftur av á stólinum og hyggur sannførdur fram fyri seg. Hann smílist.

- Sjálvsagt! Eg elski at spæla fyri Føroyar, og eg elski tær avbjóðingarnar, sum eg fái á føroyska landsliðnum, svarar hann, tá hann verður spurdur, um tað er stríðið vert at gerast danskur ríkisborgari.

Tí tað er eitt langt og drúgt stríð. Tað hevur Sorin Anghel víst á, og Finnur Hansson stuðlar hansara útsøgn.

Finnur Hansson bíðaði í gott og væl fimm ár, áðrenn hann fekk sín elddóp á føroyska hondbóltslandsliðnum í 2008.

### Strævið

Finnur Hansson kom til Føroya í 1998. Hans Guðmundsson, pápi hansara, var venjari hjá H71, og hann vildi fegin hava sonin á liðið í royndini at vinna hoyvíkingar á føroyska hondbóltstindin.

Og føroyski íslendingurin hevur verið drúgvur. Hann hevur spælt við H71, Neistanum, Kyndli og StÍF. Seinastu tvey árini hevur hann eisini verið fastur fúsur, tá føroyska landsliðið hevur verið í eldinum.

- Eg hevði neyvan spælt hondbólt, um eg ikki flutti til Føroya fyri 12 árum síðan. Og eg eri glaður fyri avgerðina, sum eg tók. Tað er mín ábyrgd at geva føroyingum nakað aftur sum landsliðsleikari, sigur Finnur Hansson.

Tað er fyrst og fremst orsøkin, at Finnur Hansson valdi at spyrja um danska ríkisborgaraskap.

Hann fór fyrstu ferð á løgreglustøðina at søkja í 2004. Boðini til hansara vóru greið. Tað var greiður fyrimunur at vera íslendingur, tí hann hevði havt frálæru í donskum í íslendska fólkaskúlanum. Men tað fór framvegis at taka honum nøkur ár.

Og meðan føroyska landsliðið royndi seg í Evropa, sat Finnur Hansson í norðuratlandshavinum og bíðaði.

### Ísland oyðilegði spælið

Finnur Hansson valdi at flyta til Íslands í 2006. Hann vildi vita, hvussu hann fór at støðast í heimlandinum, men flutti til Føroya og StÍF undan kappingarárinum í 2007.

Tá hann fekk fótin fastan á føroyska oyggjalandi, varð ein brævbjálvi handaður honum. Finnur Hansson fekk boðini, at myndugleikin hevði leitað eftir honum og kom fram til, at hann búði í Íslandi. Tí var fyrispurningurin vístur aftur.

Tað vóru tá fýra ár síðan, hann søkti um danskan ríkisborgaraskap.

Finnur Hansson flutti til Neistan undan kappingarárinum í 2008. Høvuðsstaðarfelagið hevði Jugoslav Djumic, David Edvardsen og Blagoje Buha í hópinum, og løggavan sigur, at føroysk lið kunnu ikki hava fleiri enn tríggjar útlendingar á vøllinum. Tí var neyðugt hjá Finni Hansson at søkja um danskan ríkisborgaraskap. Og við stórslignari hjálp, sum hann tekur til, fekk hann føroysk pass í august í 2008.

### Tað er eitt stríð

Finnur Hansson kennir væl støðuna, sum Sorin Anghel er í. Og hann stuðlar honum fult og fast.

- Hann hevur onga orsøk at gevast og kasta frá sær. Eg veit, at hugurin er ofta til tað. Men tá tú eina ferð kemur á mál, so er tað fantastiskt, sigur Finnur Hansson.

uni@sosialurin.fo